# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nú mugu stóru tøkini takast

Stuðlarnir undir vælferðarskipanini eru á dagsskrá. Eftir at tingið fyri jól samtykti fíggjarlógina, hevur tað aftur og aftur verið at hoyrt, at játtanin til vælferðarøkini ikki fer at røkka.
Tørvurin á røktarplássum er akuttur. Heimahjálpin er ikki longur tað, sum hon eina ferð var, og eldra tilhaldini fáa ikki tingini at hanga saman.
Hjá sjúkrahúsunum er neyðugt at spara, misnøgd er í fólkaskúlanum, játtanin til miðnámsskúlarnar er skerd, sparingin í Vinnuskúlanum gongur út yvir uppkvalifisering og upptøku, og á Fróðskaparsetrinum eru allar ætlanir um menning og frambrot lagdar til viks, meðan ætlaða lokomotivið í búskapinum berjist fyri lívinum.
Tað er positivt, at áhugin fyri at taka lut í orðaskiftinum um eitt nú tað, sum er nevnt omanfyri, er so stórur. Tað boðar frá, at týdningarmiklasti parturin av fólkaræðinum – fólksliga orðaskiftið – riggar væl. Seinastu vikurnar hevur áhugin fyri at luttaka á fundum víst seg at vera rættuliga stór, og fráboðanir, yvirlýsingar og viðmerkingar hava verið at sæð um so mangt.
Politikkur og broytingar í lógum og ásetingum er ikki sum at matgera í mikroovni. Tað tekur sína tíð. Men tað er ein lyklaspurningur, um strongdin og máttloysið, sum seinasta mánaðin er komið til sjóndar í orðaskiftinum ikki eru undirstriking av, at politisku og umsitingarligu skipanirnar ikki hava meiri enn ilt við at finna kós og ferð, sum ber við sær, at tað fer at verða samband millum fíggarlógina og ynskini um varðveiting og betring av valferðarøkjunum.
Ov ofta tykist tað, sum um at samskiftið ikki er nóg gott, og at ymsu partarnir tosa framvið hvørjum øðrum. Og ov ofta kennist tað sum um, at politikarar, fakfólk og ymsu samfelagsligu áhugamálini eru hugað at gera broytingar við tí treyt, at tað, sum júst tey hava ábyrgdina av, skal vera, sum tað altíð hevur verið!
Um ikki so nógvar mánaðir verður farið undir arbeiðið við 2010 fíggjarlógaruppskotinum. Um tað ikki verður farið undir grundleggjandi reformarbeiðið, so verða lógir og ásetingar, sum játtanir skulu grundast á, júst tær somu, sum tær nú eru. Og harvið verður støðan júst tann sama, sum hon er og hevur verið.
Tí er neyðugt, at politiski myndugleikin tekur sær um reiggj. Tað er neyðugt at loysa kommunuspurningin og so mangar spurningar, sum eitt nú hava við spurningin um býtið millum landið og kommunurnar at gera.
Í vikuskiftinum hevur formaðurin í mentamálanevndini spælt út við somu áskoðan, sum formaðurin í Lærarafelagnum fleiri ferðir hevur havt frammi um, hvussu fólkaskúlin skal skipast, og í síðstu viku søgdu fleiri seg vera sinnað at gera royndarskipan við eldraøkinum.
Løgmaður segði í síðstu viku, at 61 uppskot til viðgerð í Løgtinginum verða fyrireikað í aðalráðunum. Vit mugu ganga út frá, at mong teirra hava við hesi viðurskiftini at gera. Tað er nú og júst nú, at stóru tøkini skulu takast, og tað er nú og júst nú, at politikararnir skulu vísa, at tey eru før fyri at trimma okkara vælferðarsamfelag.

**Sosialurin**

## Miðvingar og Vágoyggin partur av ríkidømi



**GERHARD LOGNBERG**
løgtingsmaður

Eg havi onkrar viðmerkingar til tað tos, sum er blivið av málinum viðvíkjandi kvotuni hjá skipunum, sum veiða uppisjóvarfisk.

Nú havi eg verið partur av vinnunevndini alla tíðina, frá eg kom í tingið til nú eg, av ymiskum orsøkum, valdi Rættarnevndina.

Tann vinninevndin, ið sat tey seinastu 4 árini, gjørdi stórar broytingar nettupp fyri at fara forða spekullatión. Eg kann tildømis nevna ta størstu broyting. Tú hevur ikki loyvi at selja dagar, um tú ikki hevur fiskað 60% av døgunum ári fyri.

Tú kann ikki keypa útróðrarbátar nú og leggja teir saman. Tildømis var vanligt at keypa 20 tonsarar, sum áttu dagar á Føroya Banka og leggja teir saman við línuskipum.

Tú kann ikki selja ímillum trol og húk. Hetta eru stórar broytingar, so kunnu fólk vera samd ella ósamd.

Tað, sum fekk meg at skriva hesar viðmerkingar sum eitt positivt íkast. Eg síggi at flokkurin hjá mær er úti við einari yvirlýsing, har vit mótmala býti av svartkafti. Á myndini sum fylgir við tekstinum siti eg einsamallur á eini mynd og kann tað virka sum tað eri eg, sum eri arkitekturin til yvirlýsingina. Tað er ikki so, eg kenni einki til hesa yvirlýsing. Helst havi eg ikki verið á fundi, tá hetta er viðgjørt.

Tá sagt verður, at "Atlansfarið" og "Saksaberg" ikki skulu hava kvotu, tí hugsast kann at teir fara at selja, ja so má eg, sum nú fyrrverandi vinnunevndarlimur, viðmerkja at svartkjaftakvotan er felagskvota og har hevur onkur misskilt okkurt. Tú kann ikki spekulera í felagskvotum, so tað sum sipað verður til at "Atlansfarið" og "Saksaberg" fara at spekulera og selja, tað er ikki so.

**Eg eri** ógvuliga hugstoyttur og keddur av, at nakar hevur ilt av, at eitt skip úr Miðvági sleppur at fiska, so tit sum eiga "Atlansfarið", eg gleðist um, at tit eru blivnir partur av hesum ríkidømi. Tí Vágoyggin hevur ikki spunnið gull av svartkjaftakvotuni.

So til seinast ynski eg øllum tí føroyska flotanum alt tað besta í hesum nýggja árinum sum liggur fyri framman, tykkara partur at bera hetta land liggur ikki eftir.

Við javnaðarkvøðu.

## Rættleiðing til Signar á Brúnni, fyrrverandi býráðslim



**SIGURÐ S. SIMONSEN**
borgarstjóri

Í lesarabrævi tínum 27. januar sigur tú, at tú gjørdist rættiliga illa við, tá ið útvarpið "fyri stuttum" hevði samrøðu við býráðsformannin í Fuglafirði um m.a spurningin um samanlegging av Leirvíkar, Gøtu og Fuglafjarðar kommunum.

Fyrst er at siga, at henda samrøða varð send fyri útvið einum hálvum ári síðan, og tá ið hugsað verður um at tíðindi eru í útvarpinum at siga hvønn tíma á degnum, ljóðar tað, sum um at tú toyggir relativitetshugtakið so mikið nógv, at tað nærkast villeiðing.

Í lesarabrævinum sigur tú eisini, at tú gjørdist illa við av tí, sum býráðsformaðurin greiddi frá, ið farið var fram á býráðsfundinum, sum var varð hildin fyri afturlatnum hurðum. Men hetta er ikki rætt. Býráðsformaðurin gretti ikki eitt orð um viðgerðina av málinum, og tí, sum farið var fram á fundinum, t.e. um orðaskifti ella skjalatilfarð. Harafturímóti hevur tú í lesarabrævi tínum brotið tagnarskylduna í báðum hesum førum. Tað, sum býráðsformaðurin segði, var úrslitið av atkvøðugreiðsluni av aktuella málinum. Niðurstøðan var longu send Leirvík og Gøtu og var sostatt almannakunngjørd – sum annars var ein sjálvfylgja.

Tú sigur eisini, at upplýsingarnar, sum býráðsformaðurin gav í samrøðuni við útvarpið vóru villeiðandi. Her er at siga, at fyrispurningurin frá Leirvík og Gøtu var klokkuklárur og ítøkiligur: Spurt varð, um Fuglafjarðar kommuna var sinnað at leggja saman við Leirvíkar og Gøtu kommunu her og nú; hetta hevði nevnliga skund, um tað skuldi eydnast at fullføra samanleggingina í inniverandi valskeiði.

Niðurstøðan og svarið frá Fuglafjarðar kommunu var líka klokkuklárt og ikki at taka feil av, tí býráðið metti ikki røttu løtuna vera júst nú. Takkað varð nei, og sagt varð, at málið kundi vera standandi opið til næsta býráð at umrøða. Upplýsast skal, at allir 9 býráðslimirnir tóku undir við hesari niðurstøðu.

At tú sigur teg hava sagt, at eitt kommunustýri, sum kom aftaná, átti at taka avgerðina, telur ikki. Eitt sitandi kommunustýri kann ikki atkvøða um, hvat eitt annað býráð skal atkvøða um ella gera. Borðið bindur, og býráðið, ið tú sat í, atkvøddi einmælt um ikki at taka av tilboðnum frá Leirvíkar og Gøtu kommunu um at leggja kommununar saman í teirri setunu, sum endaði 31.12.2008.

Tað var hetta, sum býráðsformaðurin svaraði útvarpskvinnuni fyri útvið hálvum ári síðan upp á fyrispurningin. Eg vil tí við hesum afturvísa tínar ákærur um villeiðing og falskar tónar frá mínari síðu.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.